**Semja**

**millum**

**Fysioterapeutfelag Føroya og Ergoterapeutfelagið øðrumegin**

**og**

**Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hinumegin**

**Sáttmálaskeið og lønarhækkanir:**
Verandi sáttmáli verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2020 til 1. januar 2023.
Tann 1. januar 2021 hækka mánaðarlønirnar 2,05%.
Tann 1. oktober 2021 hækka mánaðarlønirnar 1,25%.
Tann 1. januar 2022 lækkar eftirlønargjaldið úr 15,8% niður í 15%.

Skalagongdin hjá terapeutum er tann 1. januar 2021 soleiðis: 1, 3, 5, 9 og 15. Tann 1. oktober 2022 er skalagongdin 1, 3, 5, 9 og 17.

Flokkingin av leiðandi terapeutum er frá stig 28. til 35 og er galdandi frá 1. januar 2022. Hesir leiðarar fáa ikki annað enn grundløn.

Leiðandi terapeutur á Landssjúkrahúsinum er á stig 33
Varaleiðarin á Landssjúkrahúsinum er á stig 28
Leiðandi terapeutur á Psykiatrideplinum er á stig 30
Leiðandi terapeutar á Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahúsum eru á stig 30
Stovnsleiðari er á stig 35

Leiðandi terapeutar í eldrarøktini/á kommunala sáttmálaøkinum verða fluttir á stig 30

Terapeutar sum undirvísa á Heilsuskúlanum, skulu flokkast á stig 19 galdandi frá 1. okt. 2021. Afturat hesi flokking, skulu tey hava eina viðbót – um tey hava ella tá ið tey hava fingið pedagogikum- á kr. 2.591,-.

**Broytingar í sáttmálatekstinum**
Partarnir eru samdir um fleiri broytingar í sáttmálanum og verður sáttmálin dagførdur samsvarandi.

Í Tinganesi 28.januar 2022

Fyri

Fysioterapeutfelag Føroya og Ergoterapeutfelagið

Augusta Mikkelsen, forkvinna og Vígdis Nolsøe, forkvinna

Fyri

Kommunala Arbeiðsgevarafelag

Pauli Trónd Petersen, formaður og Anita Fuglø, leiðari

Fyri

Fíggjarmálaráðið

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður og Súsanna Nolsøe, fulltrúi